# Pedagogur/- hjálparfólk

Søkt verður eftir tveimum pedagogum/hjálparfólki til barnagarðin við Velbastaðvegin, bæði størvini eru 40 tímar um vikuna, at byrja 5. august 2002.

Størvini eru fyri fólk sum eru í barnsburðarfarloyvi. Størvini eru til 1. januar 2003 og 1. februar 2003.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3-7 ár, býtt sundur í 3 stovur. Á hvørjari stovu starvast trý starvsfólk.

Tann ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum. Viðkomandi ið settur verður, skal duga at síggja møguleikarnar í okkara náttúruumhvørvi saman við børnunum.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 3. juli 2002 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO-100 Tórshavn

# Avloysarastarv

Søkt verður eftir fólki til fulltíðarstarv á Dómaraskrivstovuni til setan skjótast gjørligt. Setanartíðin er 6 mánaðir.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðslu

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst:
- Skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- Góð evni at samskifa á føroyskum og donskum máli
- Telduførleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 311003.

**Umsóknir:**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu verða Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juli 2002.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
tann 21. juni 2002
Jørgen B. Petersen, adm.

# Fjarðahús

## Handilslærlingur

Vit søknast eftir handilslærlingi til byggibúð/timburhandil okkara. Talan er um eitt áhugavert starv, við nógvum og spennandi avbjóðingum

**Vit bjóða:**
Eitt starv á einum arbeiðsplássi, sum er í støðugari menning, har dentur verður lagdur á at veita eina góða og skjóta tænastu.

**Vit vænta:**
At tú er nærlagdur/nærløgd og ikki ert bangin fyri at taka eina hond í, og tá á stendur, eisini eftir vanliga arbeiðstíð.

**Umsókn:**
Umsókn við avritum av prógvum, og møguligum viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 01. juli 2002.

Meir fæst at vita við at venda sær til Jógvan Sigurd Poulsen, á telefon 472 000

Pf. Vestmanna Timburhandil er stovnaður í 1958, og hevur síðani í 1976 selt og framleitt tey vælumtóktu Fjarða-húsini. Í dag standa omanfyri 350 Fjarðahús í Føroyum. Umframt hetta, reka vit timburhandil og byggibúð.

**Vestmanna Timburhandil**
tel 472 000 · fax 472 001
vt@vt.fo · www.vt.fo

# Grundøkir í Havn til sølu

Um nóg høgt boð fæst, verða tvey grundøkir, ávikavist
**á Skotarók 12**, matr. nr. 1234 h Tórshavn, til støddar 492 m²
og
**á Norðurrás 19**, matr. nr. 1038 be Tórshavn, til støddar 427 m² seld.

Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110 Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advfelagid@kallnet.fo

| | |
|---|---|
| Tormóður Djurhuus, adv. | Jógvan Páll Lassen, adv. |
| Petur Even Djurhuus, adv. | Jógvan E. Ellefsen, adv. |
| Ingi Højgaard, adv | Anna Dam, adv. |

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir eftir 3 pedagogum til Stella Maris Vøggustovu.

**Størvini**
- tvey størv 30 tímar um vikuna
- eitt starv 20 tímar um vikuna
- ein sjúkraavloysara

**Stovnslýsing**
Á stovninum eru fýra vøggustovur við 11 børnum í hvørjari. Á hvørjari stovu er ein pedagogur og 2-3 hjálparfólk.

**Vit bjóða**
eitt frálíkt nærumhvørvi, har náttúran og frítíðarhentleikar ikki eru langt burtur.

**Vit ynskja**
- at tú hevur hug og áræði til at skapa ein fjølbroyttan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum.
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 14. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Føroya pedagogfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kristinu Eldevig, leiðara, tlf. 3112853 ella Katrina Petersen, samskipara tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Stella Maris Vøggustovu, Varðagøta 11, postrúm 1202, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. juli 2002.

SNARSKIVAN

# Starvsfólk til Suðuroyar Ullvirki

Søkt verður eftir fólki M/K við áhuga fyri føroyskari ull at standa fyri ullamóttøkuni.

Tíðarskeiðið verður frá 1. august til 1. november. Møguleiki er fyri at halda fram í øðrum starvi í ullvirkinum.

Arbeiðið umfatar: Móttøka, eigaraskráseting, góðskumeting, viging, avrokningarseðil og pakking.

Hevur hetta tín áhuga, send so umsókn skrivliga og í seinasta lagi 15. juli til Suðuroyar Ullvirki, Vágur. Ringjast kann á tlf. 374006 fyri at fáa meira at vita um starvið.

# Svimjihylurin

Í tíðarskeiðnum 03.07.–05.08.2002 er Svimjihylurin opin soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 19.00–21.00 |
| Onsdag | kl. 19.00–21.00 |
| Leygardag | kl. 15.00–18.00 |

**Vágs Býráð**



# Endurlýsing

# Tímalærarastørv á Føroya Lærarskúla

Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi pedagogiskum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Læraraskúla. Føroya Læraraskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnis- og verkætlanararbeiði.
Størvini, sum leys eru at søkja, eru hesi:

**Føroyskt:** Hetta er tímalærarastarv komandi skúlaárið. Uppgávuøkið er grundlærugreinin føroyskt og linjugreinin føroyskt á læraraútbúgvingini, møguliga eisini á pedagogútbúgvingini. Endaliga ásetingin av undirvísingini verður ásett í samstarvi við læraran, sum er í føstum starvi í føroyskum. Tímatalið er 8 tímar um vikuna.

**Enskt:** Hetta er tímalærarastarv komandi skúlaárið. Uppgávuøkið er linjugreinin enskt á læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 6 tímar um vikuna.

Tey, ið sett verða í størvini, eiga at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, ella aðra útbúgving, sum hóskar til uppgávurnar.

Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein ella lærugreinum við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar. Eisini fáa tey, ið sett verða, møguleika at undirvísa á teimum eftirútbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya ella avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknirnar skulu vera Føroya Læraraskúla í hendi innan 19. juli 2002.
Setanin er galdandi frá 1. august 2002.

Tey, sum ynskja fleiri upplýsingar um størvini, eru væl komin at seta seg í samband við Arna Ludvig á tlf. 421422 ella á telduposti ludvig@post.olivant.fo

**Føroya Læraraskúli**
Postsmoga 348
FO-110 Tórshavn

# ZODIAZC SRMN 500 RIB



við 70 HK Yamaha Betol motor. 2-mans setur við power stýringskonsol. VHF radio, GPS sonar og 2 x 25 l. tanga. A-mastur v/ navigatiónsljósi og GPS móttakara umfram Brenderup bátatrailara og ymisk eyka útgerð. Til sølu fyri hægsta boð.

Verður vístur fram leygardagin 29. juni frá kl. 13.00-15.00 á Argjum.

**Tlf. 319194/257246 ella**
**e-mail: uia03@kallnet.fo**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin

Broytingar

# Busskoyring í suðuroynni Jóansøkuaftan

**(leygardagin 29. juni)**

**Leið 700 Sumba-Tvøroyri**

| Sumba | Vági | Porkeri | Hov | Øravík | Tvøroyri |
|---|---|---|---|---|---|
| Tilk. | 06.15 | Tilk. | Tilk. | 06.45 | 07.00 |
| 11.50 | 12.20 | - | - | 12.50 | 13.05 |
| 14.00 | 14.30 | - | - | 15.00 | 15.15 |
| 18.15 | 18.45 | - | - | 19.15 | 19.30 |
| 22.50 | 23:20 | - | - | 23.45 | 00.00 |

**Leið 700 Tvøroyri-Sumba**

| Tvøroyri | Øravík | Hov | Porkeri | Vág | Sumba |
|---|---|---|---|---|---|
| 10.00 | 10.10 | - | - | 10.45 | Tilk. |
| 13.30 | 13.40 | - | - | 14.15 | - |
| 15.20 | 15.30 | - | - | 16.00 | - |
| 19.30 | 19.40 | - | - | 20.10 | - |
| 00.00 | 00.10 | - | - | 00.40 | - |

**Leið 702 Sandvík-Tvøroyri**

| Sandvík | Hvalba | Nes | Trongisvági | Drelnesi |
|---|---|---|---|---|
| 06.10 Tilk. | 06.20 | 03.30 Tilk. | | 06.45 |
| 09.30 | 09.35 | 09.45 | 10.00 | |
| 13.00 | 13.05 | 13:15 | 13:30 | |
| 14:45 | 14:50 | 15.00 | 15.15 | |
| 19.30 | 19.05 | 19.15 | 19.30 | |
| 23.30 | 23.35 | 23.45 | | 00.00 |

**Leið 702 Tvøroyri-Sandvík**

| Drelnesi | Trongisvági | Hvalba | Nes | Sandvík |
|---|---|---|---|---|
| 06.50 | | 07.05 | 07.10 Tilk. | 07.20 Tilk. |
| | 10.00 | 10.15 | 10.20 - | 10.30 - |
| | 13.30 | 13.45 | 13.50 - | 14.00 - |
| | 15.15 | 15.30 | 15.35 - | 15.45 - |
| | 19.30 | 19.45 | 19.50 - | 20.00 - |
| 00.15 | | 00.30 | 00.35 - | 00.45 |

**Leið 703 Fámjin-Froðba**

| Fámjin | Øravík | Drelnes | Tvøroyri | Froðba |
|---|---|---|---|---|
| 06.00 | 06.15 | | 06.30 | 06.35 |
| 12.30 | 12.45 | | 13.30 | 13.05 |
| 15.15 | 15.30 | | 15.45 | 15.50 |
| 18.15 | 18.30 | | 18.45 | 18.50 |
| 23.55 | 00.10 | 00.15 | 00.25 | 00.30 |

**Leið 703 Froðba-Fámjin**

| Froðba | Tvøroyri | Drelnes | Øravík | Fámjin |
|---|---|---|---|---|
| 06.35 | 06.45 | 06.55 | 07.00 | 07.15 |
| 13.05 | 13.15 | | 13.30 | 13.45 |
| 15.50 | 16.00 | | 16.15 | 16.30 |
| 18.50 | 19.00 | | 19.15 | 19.30 |
| 00.30 | 00.40 | | 00.55 | 01.10 |

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Bókasavnið

er stongt vegna feriu frá 8. juli–29. juli.

**Vágs Bókasavn**

# Mazda 929

árg. 83, sera bíliga til sølu. Egnaður sum ellisakfar eftir bøtandi hond.

**Tlf. 371112**

# BILVASKARI!



**Søkt verður eftir áhugaðum til at vaska og gera smærri viðlíkahaldsarbeiði á politibilunum í Tórshavn.**

Skrivlig umsókn til Politistøðina í Tórshavn, Postboks 3018, FO-110 Tórshavn